# Heilsuverkið



HERI MOHR

Í kunngerð nr. 70 frá 06.10.1977: Reglugerð fyri Sjúkraverk Føroya, seinni broytt við kunngerð nr. 42 frá 14.03.95, er undir § 16 tilskilað, hvussu yvirlæknin skal bera seg at, tá ið sjúklingur skal sendast til serviðgerð á sjúkrahúsi í Danmark:

”Áðrenn sjúklingur verður sendur niður, verður hann at visitera av serlækna á viðkomandi sjúkrahúsi. Serlæknin tekur støðu til og ger av, um sjúklingurin verður at senda niður.

*Er eingin fastur serlækni í sergreinini á sjúkrahúsinum, men tílíkur lækni er á øðrum sjúkrahúsi, verður sjúklingurin at kanna av hesum serlækna, ið so tek ur avgerðina, eisini um tað er neyðugt fyri kanningina, at sjúklingurin kemur inn á deild læknans, ella um kanningin kann gerast á annan hátt, eitt nú við telefonsamtalu við yvirlæknan á staðnum.*

*Er eingin serlækni á sjúkrahúsinum, verður sjúklingurin at kanna á Landssjúkrahúsinum.*

*Sjúklingurin verður kannaður til viðgerð á donskum sjúkrahúsi ella deild v.m., ið verður rikin ella goldin av statinum, av praktiskum orsøkum helst til Rigshospitalet.*

*Viðgerðin á niðanfyri nevndu sjúkrahúsum og deildum er eftir avtalu við ríkisstýrið kostnaðarleys fyri føroysku sjúkrahúsini (undirstrikað av hm): Rigshospitalet, herunder Kysthospitalet på Refsnæs, Ortopædisk Hospital í Keypmannahavn, Finsensinstitutet,her under Radiumstationen.” Nógv annað er fyrisett í kunngerðini okkara sjúkraverki viðvíkjandi.*

Hóast hesa kunngerð, við støði í lóg fyri Føroyar nr. 621 frá 1976, so fráboðaði landsstýrið í 2000 við bóklinginum ”Frá heimastýri til fullveldi” - borin ókeypis í hvørt hús og heim - at serviðgerðir á sjúkrahúsum í Danmark ”ikki eru tænastur, sum føroyingar fáa ókeypis. Føroysku sjúkrahúsini rinda fullan prís fyri bæði uppihald og viðgerð.”. (Undirstrikað av hm).

Hetta er beint ímóti tí, sum nevnda lóg og kunngerð hava fastsett, og má tí haldast at vera so álvarslig fráboðan, at spurningurin er, hvørt tey, ið skrivaðu bóklingin, ikki vóru vitandi um lógina og kunngerðina, ella um teksturin í hesum føri skal fortolkast !? Í hvussu er, so er hetta at síggja til ein sera ódámlig politisk atgerð.

Árið eftir hendi so tað, at landsstýrið/løgtingið gjørdi av at niðurfrysta blokkin í 5 ár frá 2002 til 2006. Hetta árið (2001) kostaði serviðgerðir á sjúkrahúsum í Danmark 70,8 milliónir, og í samsvar við lóg og kunngerð varð tað fíggjað av ríkiskassanum (í blokkinum), og í 2006 vóru hesar útreiðslur komnar upp á 103 milliónir, meðan fíggingin úr ríkiskassanum (blokkinum) orsakað av niðurfrystingini var óbroytt 70,8 milliónir um árið. Við støði í landskassans roknskapum kann staðfestast, at í nevnda 5-ára skeiði hava serviðgerðir á Ríkishospitalinum kostað samanlagt 472,9 milliónir, meðan tann niðurfrysta upphæddin til sama endamál var 354 milliónir. Munurin millum hesar báðar upphæddir – 118,9 milliónir – er fíggjað úr landskassans likviditeti (gjaldføri).

Við slíkari niðurfrysting kemur einki termometur í almennari nýtslu upp á ella niður á 37.

Vit kunnu illa ímynda okkum tann fullkomna ruðuleikan, um kostnaðurin til dómsvaldið, politivaldið, hundraðtals lesandi í Danmark, fólkatingslønir (sambært fráboðan er ein fjórðingur oyramerktur til Tjóðveldisflokkin), uttanríkistænastan í øllum heimsins londum v.m. varð stappað í blokkin 1988 og 14 ár seinni niðurfryst á sama hátt sum heilsuverkið og almannaverkið varð fyri skjótt 6 árum síðani.

Fyri at sleppa okkum úr tí fíggjarligu fløkjuni viðvíkjandi Ríkishospitalinum - heilsuverkinum í síni heild - og almannaverkinum, áttu okkara løgtingsmenn skjótast gjørligt at fingið blokkin til nevndu málsøki úr ”djúpfrystaranum” og dagførdan. Núverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum, sum føroyingar í stóran mun hava álit á, so sannførandi hevur hann greitt frá góðum og vánaligum fíggjarpolitikki, átti at sundurliða heildarveitingina í løgtingsfíggjarlógini, 20.54.1. Hetta hevði verið ein fyrimunur hjá løgtingsmonnunum, tá ið fíggjarlógin er til viðgerðar.

Tann niðurfrysta heildarveitingin sundurliðar seg soleiðis:

**Heilsuverkið:**
Tey føroysku sjúkrahúsini 157,0 mió.
Ríkishospitalið 71,0 mió.
Annað 55,0 mió.

**Almannaverkið:**
Pensiónir v.m. 213,3 mió.
Serforsorg 117,0 mió.
Fiskirannsóknarstovan 1,6 mió.

Um nú løgtingið tók stig til at fáa heildarveitingina úr djúpfrystaranum, hevði tað kanska ikki verið neyðugt at selt høghúsini á Frælsinum. Umbygging, umvæling og umsiting av øllum trimum sjúkrahúsunum kundi komið í eina sámiliga fíggjarlegu. Og - *last but not least: Tað* hevði verið ein sjónlig virðing fyri gomlum, sjúkum og brekaðum; ein virðing, sum sømir seg fyri framkomnum fólki. Niðurfrystingin, sum her umrødd, ber á brá at tey veikastu í okkara samfelagi eru eyðmýkt av politiskum myndugleikum.

## 2015 hevur helvtin av Føroyum 7 min. á flogvøllin!

ANDREAS PETERSEN
ap@post.olivant.fo

Nú er tíð upp á at fara undir at gera flogvøll á Glyvursnesi, so yvirskriftin verður til veruleika - alt annað er burtur við, allir aðrir høvuðstaðir hava floghavn við hondina, taka vit eitt nú Keypmannahavn og París t.d.

Nú skula vit aftur brúka pengar upp á flogvøllin har vestri – mín støða er púra greið, flogvøllurin í Vagum skal bara haldast við líka til tann á Glyvursnesi er klárur og hareftur sum ein alternativ floghavn.

Okkara dugnaligu flogskiparar hava longu verið frammi og sagt, at flogvøllurin í Vagum ongantíð verður betur enn næstbest. At brúka meira pengar upp á vøllin har vesturi er burturspilt, og at leggja hann á Sandoynni er ein onnur oyðimørk.

Tíðirnar eru nógv, broyttar síðan flogvøllurin í Vágum kom – nú er tann føroyski flogvøllurin blivin ein partur av arbeiðinum hjá so nógvum føroyinum, eg hugsi um tey sum flúgva í arbeidsørindum bæði á landi og sjógvi. Sjálvur flúgvi eg nógv í samband við mítt altjóða arbeiði runt um í verðini, og ringast er at lenda í Føroyum/Vágum.

Ein flogvøllur á Glyvursnesi í altjóða støð er lykilin til framtíðina – eisini standa vit á gáttini til eina oljuvinnu har flúgving bara er eitt ‘must’ - har eisini er neyðugt við einari alternativari lufthavn – tað skal bara koyra. Eg hugsi eisini um útflutning loftvegis av feskum alifiski laksi og toski t. d. Síggi fyri mær eitt farmaflogfar lætta sær við fleiri hundrað tonsum av alitoski beinleiðis á japanska marknaðin t. d.

So her muga menn sum varða av hesum økjum – stinga høvdini saman og koma ígongd so flogvøll a Glyvursnesi blívur til veruleika landi og fólki at gagni.

# Búskapurin SKAL vaksa



HEÐIN MORTENSEN
Borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

Hin 22. juni 2007 var áhugaverdur fundur hildin í Fíggjarmálaráðnum. Nýtilnevndi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Magni Laksáfoss hevði kallað umboð fyri arbeiðsmarknaðin, vinnuna, fíggjarstovnar og kommunur á fund at umrøða búskaparútlitini í sambandi við fíggjarlógina 2008.

Landsstýrismaðurin legði stóran dent á, at tað almenna skuldi tálma serliga íløgunum, tí búskaparvøksturin eftir hansara tykki var ov stórur.

Hesum sjónarmiði fekk hann tó als ikki treytaleysa undirtøku fyri. Fleiri ávaraðu m.a. um, at ein minking í almennu íløgunum fer at seta ferð á eina stóra búskaparniðurgongd.

Eisini vístu fleiri á, at í føroyska samfelagnum eru ymsir strukturellir skeivleikar, sum gera, at búskaparvøksturin av sær sjálvum steðgar upp, verður einki gjørt. Ein tann størsta forðingin er trot á arbeiðsmegi. Staðfestast kann, at landsstýrið ikki hevur loyst hetta álvarsmál, og at Magni Laksáfoss á nevnda fundi segði, at tað heldur ikki var hansara borð.

Landsstýrismaðurin hevur als ikki lurtað eftir ráðunum, tí hann hevur start seg púra blindan uppá eittans mál, ið er at steðga búskaparvøkstrinum. Øll onnur í samfelagnum hava annars eitt annað mál, ið er at vaksa um búskapin til tess at skapa betri vælferð fyri øll.

**Kommunurnar bindast niður**

Stýring skal til, treyðugt so, og tað er uppgávan hjá landinum at skipa karmarnar. Man kann velja detailstýring og harvið kvala allan framburð, ella man velja frælsari stýring og álit, ið er kveikjandi og mennandi fyri framburð í øllum samfelagsliðum.

Magni Laksáfoss hevur bæði sum limur í Búskaparráðnum og nú sum landsstýrismaður talað fyri meira detailstýring av føroysku kommununum. Hann er ikki nøgdur við galdandi kommunustýrislóg, har kommunurnar stýra fíggjarviðurskiftunum sjálvar tó við teirri skilagóðu avmarking, at lánskuldin skal ikki vera størri enn ein skattaálíkning.

Men Magni Laksáfoss hevur als ikki skilt, hvat virksemið fer fram í kommununum. Hann hevur heldur ikki skilt, hvørjar uppgávur, kommunurnar loysa, og hvør hevur álagt kommununum útreiðslurnar. Hann hevur heldur ikki skilt, hvønn týdning kommunurnar hava í samfelagnum og allar minst hevur hann skilt nakað av, hvørjum kommunurnar tæna.

Tað eru í stóran mun kommunurnar, ið skapa almennu framdriftina og búgva undirstøðukervið til at loysa avbjóðingarnar og tryggja vælferðina. At binda virkisfrælsið hjá kommununum niður í detailstýring fer at forkoma hesum.

**Høvuðstaðurin, landið og Visjón 2015**

Tórshavnar kommuna hevur, sum tann størsta kommunan í landinum, serligar skyldur eisini sum høvuðsstaður í einum landi, ið hevur sett sær stór mál fyri føroyska vælferðarsamfelagið anno 2015 í einum altjóðagjørdum heimi.

Her búgva sum er 40 % av íbúgvunum, og dagliga brúka kanska eini 60-70 % av landsins íbúgvum býin her antin í arbeiði, útbúgving, frítíð og tænastum annars.

Eingin ivi skal vera um, at vit í Tórshavnar býráði og kommunan øll gleðiliga tekur á seg hesar skyldur. Ein livandi miðdepil er eisini fortreyt fyri lívið og menning eisini kring landið.

Vit kenna uppgávuna. Vit kenna ábyrgdina. Og vit loysa málini – eisini tey, ið landið hevur forsømt uppá tað grovasta.

Men tað er øllum greitt, at tað kostar pening ikki minst í íløgum. Uppskotið til fíggjarætlan fyri 2008 hjá Tórshavnar kommunu er framsíggin, framsøkin og – ikki minst – alneyðug til tess at lúka lógarkrøvini, ið landið hevur sett, og tey sjálvsøgdu krøvini, sum borgararnir seta einum nýtímans høvuðstaði bæði í mun til undirstøðukervi, vælferð og trivna.

Ætlanirnar eru lagdar og fíggingin tøk. Men Magni Laksáfoss hevur kvitterað við at skýra okkum ábyrgdarloysingar. Tað er nógv fyri.

**Hvussu stórur verður útreiðsluvøksturin?**

Eingin veit, hvussu stórur samlaði kommunali útreiðsluvøksturin í veruleikanum verður. Vit tosað enn bert um fíggjarætlanaruppskot fyri komandi ár, og veruligi útreiðsluvøksturin verður ikki staðfestir fyrr enn seinni.

Rakstrarútreiðslurnar vaksa altíð nakað í sambandi við lønarvøkstur á arbeiðsmarknaðinum, men íløgur eru eingangsútreiðslur, sum í mongum førum er við til at tálma vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum, tí íløgurnar skapa møguleikar fyri effektivari rakstri og harvið sparingar.

Fíggjarstøðan hjá flestu kommununum er so mikið góð, at hetta er rætta tíðin til íløgur.

Men Magni Laksáfoss hevur megnað at fáa orðið íløgur til at ljóða ljótt og vandamikið, og kanska var best, at ongar íløgur vóru.

**Hvat kann gerast?**

Magni Laksáfoss hóttir nú við lógarinntrivum og politiskum átøkum, tí kommunurnar seta eld í búskapin. Í øllum førum skal Tórshavnar kommuna ikki sleppa at gera sínar íløgur, tí tað er ivaleyst politiskt sjálvmorð at seta somu krøv til allar hinar kommunurnar kring landið. Tosið um útjavning er eisini tað sama – tak frá Havnini og gev hinum, so at Havnin kann haldast niðri.

Kommunurnar vilja fegnar samráðast við landið um yvirskipaða búskaparstýring, ið eisini tekur atlit til lógarkrøv og íløgutørv, men higar til dags hava ongar samráðingar verið, bert einvegis docering og diktering frá landsstýrismanninum. Tað er óvirðiligt.

Men er eldur í búskapinum? Hvat søgdu tey, ið gøvu landsstýrismanninum ráð á fundinum um búskaparútlitini? Og hví lurtar Magni Laksáfoss ikki?